HB-GÍ 3-0 (2-0):

# Professionelt handverk



Ikki minst er tað verjuparturin hjá HB, sum er sannførandi, og millum annað hevur afturkomni Jan Dam givið liðnum fleiri streingir at spæla uppá í so máta

*Mynd: Finnur Justinussen*

**Hóast GÍ í løtum trýsti HB, og hóast gøtumenn høvdu bóltin størsta partin av tíðini, so vann HB ein tryggan 3-0 sigur, og halda sostatt framvegis fast um oddasessin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var hampuliga stórur spenningur, tá HB fyri fjórðu ferð í ár skuldi royna seg í Gundadali. Higartil hevði oddaliðið vunnið tríggjar teir fyrstu landskappingardystirnar, og í so máta var optimisman stór í HB-leguni.

Støðan var tó eitt sindur álík henni í fjør, tá GÍ vitjaði í triðja umfarinum. Ta ferðina vann GÍ, og sum árið leið, skuldi tað vísa seg, at júst hesin dysturin kanska meira enn nakar annar var viðvirkandi til niðurtúrin, sum HB tá fekk.

## Opin byrjan

Sálarliga mundi hetta eisini vera ein týdningarmikil barlast hjá GÍ, og beint sum dysturin byrjaði sást eisini, at teir ikki høvdu nakra ovurstóra virðing fyri HB-liðnum.

Ikki soleiðis at teir alt fyri eitt løgdu trýst móti HB-málinum, men spælið var rættiliga opið hesa fyrstu løtuna. Bæði liðini royndu at spæla seg ígjøgnum, og tó at talan ikki gjørdist um teir heilt opnu møguleikarnar, so stóðust vandafullar støður av, tá liðini bæði royndu at koma ígjøgnum.

Hjá HB var tað serliga við longum diagonalsendingum av miðvøllinum, at møguleikarnir vórðu skaptir, og tað var eisini eftir júst ein av hesum, at fyrsta málið í dystinum kom. Aloftast var Rógvi Jacobsen upphavsmaður til hesar, men hesaferð hevði Uni Arge so hætta sær aftur á vøllin. Hann sendi bóltin inn um verjuna. Jón Rói Jacobsen kapprann við verjuleikara og málverja, og tá unga stjørnan hjá HB fekk prikað inn um málverjan, kundi Rógvi illa gera annað enn at sparka bóltin seinasta pettið í málið.

## Ov einstáttað

Sum tað so ofta er hent fyrr í ár, so viðførdi málið, at HB tók seg nakað aftur á vøllin. Í størstan mun royndu teir at leggja dent á verjuspælið, og hetta eydnaðist teimum eisini sera væl. Hóast GÍ hevði bóltin tað nógva av tíðini, so megnaðu teir sjáldan at skapa teir heilt stóru møguleikarnar. Ikki minst tí miðverjan hjá HB tóktist sera stinn í luftspælinum, soleiðis at allar flestu innleggini vórðu beind burtur av vandaleið beinanvegin.

Tað er í hesum sambandi tó vert at leggja til merkis, at gøtumenn hesa løtuna sýndu óvanliga lítið taktist hugflog, við mest sum konsekvent at royna at spæla seg upp ígjøgnum høgru álopssíðu. Um talan yvirhøvur var um nakran veikleika í HB verjuni, so mundi tað vera hinumegin, har Tór-Ingar Akselsen fleiri ferðir hevði hug at liggja nakað frammarliga, og tær fáu ferðirnar GÍ at spæla ígjøgnum í teirri síðuni, eydnaðist teimum eisini fleiri ferðir at koma oman at baklinjuni, soleiðis at bóltar kundu sendast innfyri.

Hóast tað soleiðis eydnaðist HB at halda tætt í verjupartinum, so gjørdist trýstið frá gøtumonnunum alsamt størri. Í longum løtum ferðaðist bólturin kring HB brotsteigin. Varð sparkaður út frá, fyri síðani aftur at fara á hóttandi rundferð sína, men við eitt, so svaraði HB aftur.

Rúni Nolsøe vann bóltin á miðvøllinum, og tá GÍ verjan ikki fann rættiliga útav, hvussu uppgávurnar skuldu býtast, so slepti Rúni inn um, tá báðir í miðverjuni komu ímóti. Andrew av Fløtum helt einsamallur oman móti málinum, og meðan Hallur Hansen ikki visti rættiliga, um hann skuldi bíða ella koma ímóti, rullaði Andrew kølin bóltin í meskarnar.

Tað er ilt at siga, hvat kundi hent, um HB ikki skoraði júst um hetta mundið. Í øllum førum tóktist leikararnir nú somikið moyrir eftir stóra trýsti, at teir av øllum tóktust lætnaðir, nú munurin nú var øktur í tvey mál.

## Greiddu skylduna

Tað, sum eftir var av dystinum, mundi fyri áskoðaran í mangar mátar tykjast heldur einstáttað. Ikki endiliga tí at spælið var so keðiligt, men meira tí at HB-liðið sýndi eitt slíkt slag av proffesioalismu, sum tú sjáldan sært tað her heima.

Í verjupartinum stongdu teir fullkomuliga. Tór-Ingar, ið sum nevnt hevði ligið heldur frammarliga, varð í hálvleikinum togaður eitt lítið vet aftur. Miðvøllurin arbeiddi sera hart, so skjótt GÍ kom yvir um miðlinjuna, og so bíðaði HB annars bara eftir, at GÍ framdi okkurt mistakið.

Størsta partin av seinna hálvleiki var tað soleiðis, at gøtumenninir høvdu bóltin, men satt at siga, so eydnaðist teimum ikki at skapa ein hin einasta møguleika. Hinvegin var fleiri ferðir vandi á ferð, tá HB royndi at kontra, og fimm minuttir fyri leiklok varð sigurin fullkomuliga staðfestur. Rógvi sendi diagonalt yvir í høgra borð, har Rúni Nolsøe kom rennandi. Í fullari ferð tamdi liðskaparin og dróg inn um verjuleikara í somu rørslu, og tá hann rullaði flatt inn, stóð Jón Rói Jacobsen púrasta leysur, soleiðis at Hallur í málinum var fullkomuliga seldur.

## Besta boðið

Samanumtikið kann ikki sigast annað enn, at HB framvegis tykist besta boðið upp á eitt oddalið, tá tey 18 umførini eru farin. Roknast kundi við, at GÍ var ein veruligur avbjóðari til oddasessin, og enn er kanska ov tíðliga at avskriva teir.

Hóast breiddin í hópinum kann gerast stóri bágin hjá teimum, so telir liðið hópin av góðum fótbóltsleikarum, og ikki minst man miðvøllurin vera ein hin sterkasti í landinum. Tí kann tað eisini undra, at teir ikki í størri mun kundu gera sær dælt av, at HB í somikið stóran mun lat gestirnar um at hava spælið.

Hetta sigur tó eisini nakað um, hvussu sterkt HB liðið er í verjupartinum. Álopsparturin hevur longu prógvað, at hann er ein hin mest vandamikli í landinum, men hesaferð var tað so serliga í verjupartinum, at liðið var imponerandi. Eitt er, at liðið telir somikið frægar verjuleikarar, at tað eru ráð til framhaldandi at hava Hans á Lag úti á bakkinum. Annað er tað, at tá teir eru í verjustøðu, so er tað eitt heilt lið, sum verjir. Teir tríggir á miðvøllinum arbeiða alla tíðina knallhart, og meira enn tí einu ferðina vóru bæði Andrew og Jón Rói afturi at hjálpa. Soleiðis spælir eitt lið, og so leingi HB heldur á við hesum, er ilt at síggja, hvør skal kunna koppa teimum. Gamaní hava fýra teir fyrstu dystirnir verið í Havn, men mótstøðuliðini hava øll talst millum tey á pappírinum torføru, og úrtøkan hjá havnarliðnum talar fyri seg.

### Dysturin í tølum

**HB-GÍ 3-0 (2-0)**
1-0: Rógvi Jacbsen, 17.
2-0: Andrew av Fløtum
3-0: Jón Rói Jacobsen

Dómari: Birgir Sondum: Hevði yvirhøvur eitt gott tak um dystin, og ikki minst var tað gott at síggja, hvussu skjótt hann setti leikararnar upp á pláss, tá einstakar ógvusligar taklingar vóru at síggja.

HB: Bárður Johannesen – Tór-Ingar Akselsen, Jóhannis Joensen, Jan C. Dam, Hans á Lag – Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen, Hallur Danielsen – Jón Rói Jacobsen, Uni Arge, Andrew av Fløtum
GÍ: Hallur Hansen – Hans Pauli Petersen, Pól Ennigarð, Leivur Hansen, Áslakur R. Petersen – Magni Jarnskor, Súni Olsen, Sámal Joensen, Zdizlaw Janik – Súni Fríði Johannesen, Krzyztof Popczynski



EB/STreymur-NSÍ 1-2 (0-1):

# Jens Martin stórbjargaði í síðstu løtu



Sorin Anghel, sum her strýkur framvið Djóna N. Joensen fekk sítt fyrsta mál í ár, tá hann gjørdi fulla nyttu úr brotssparki

*Mynd: Sofus Johannesen*

**NSÍ misýtti nógvar møguleikar, men í síðsta løtu var tað meistarlig bjarging hjá veteraninum í málinum, sum hevði við sær, at øll stigini fóru til Runavíkar**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

NSÍ fór við øllum stigunum av Mølini á Eiði. Talan var um tætta og javna uppgerð. NSÍ hevði fleiri møguleikar. Hjá EB/Streymi knípti tað enn eina ferð at fáa opnar møguleikar burturúr stríðnum og viljanum at streingja mótstøðumenninar frammarlaga á vøllinum. Men í síðstu løtu hevði EB/Streymur eina góða roynd ímóti málinum, sum ivaleyst átti at havt borið mál við sær. Men Jens Martin Knudsen bjargaði sera væl, og júst tann bjargingin gjørdi, at NSÍ einki misti, og at EB/Streymur einki fekk.

EB/Streymur hevði horna, kontra kom á skotroyndina, bólturin støkk út frá til Ronnie Samuelsen, sum smekkaði til, og tá Jens Martin Knudsen tveitti seg í fulla longd, sást einki til, at hann er miðskeiðis í tríati árunum, og at tað eru fjúrtan ár síðani, at hann fyrstu ferð vardi landsliðsmálið.

## Onkrar broytingar

EB/Streymur hevur fínan hugburð, og tað er lítið at ivast í, at teir fara at vinna og fáa stig. Teir eiga rós fyri, at teir ikki liggja aftarlaga á vøllinum og lúra. Miðvallararnir byrgja fyri frammarlaga á vøllinum, og møguleikin lúrir alla tíðina fyri, at teir skulu koma ímillum frammarlaga á vøllinum, og at Sorin Anghel harvið skal gerast vandamikil.

Í fyrstu umførunum hevur Pacek verið í álopinum. Hesa ferð hevði Trygvi Mortensen flutt hann aftur í miðverjuna, har hann ansaði høvuðsterka Óla Hansen. Sorin Anghel var einsamallur á toppinum hjá EB/Streymi, og so stuðlaðu Teitur Joensen og Hans Pauli Samuelsen hvør sínu megin.

Hjá NSÍ var Djóni N. Joensen aftur í miðverjuni, meðan Pól Thorsteinsson var á vongverjanum, sum Brynjolvur Nielsen hevur verið á. Christian Høgni Jacosben var í álopinum. Honum eydnaðist ikki at skora, men hann hevði fleiri møguleikar at gera tað. Av tí at EB/Streymur var so framrættað, so kom tað fleiri ferðir fyri, at NSÍ í skjótum álopum varð yvirmannað. Kanska einar fimm ferðir vóru teir tríggir ímóti tveimum, men tað eydnaðist ikki at fáa mál, tí tann síðsta sendingin var ikki nóg neyv.

## Málini

Fyritreytirnar hjá NSÍ styrknaðu nógv beinanvegin. Bara sjey minuttir vóru farnir, tá NSÍ megnaði at sekta líkasælt verjuspæl. NSÍ menninir tveittu skjótt innkast, sum Óli Hansen snittaði við høvdinum longur inn í brotsteigin, EB/Streyma menninir vóru ikki komnir í ansingarstøðurnar, og so var Jónstein Petersen leysur og kundi seta bóltin í málið aftanfyri Gunnar á Steig.

Seinna umfarið var knappliga tjúgu minuttir gamalt, tá EB/Streymur javnaði. Teitur Joensen hevði bóltin á baklinjuni úti við brotsteigarmarkið, men ólukkutíð fyri NSÍ, so var verjumaðurin og ótolin. Í staðin fyri at bíða til ungu maðurin, sum var í púra vandaleysari støðu, flutti seg við bóltinum, so varð roynt at takla, álopsmaðurin lá flatur, og Sorin Anghel var tryggur úr ellivu metrum.

Tá EB/Streymur hevði javnað, skifti Jógvan Martin Olsen út. Helgi L. Petersen, sum hevði verið skaddur alla vikuna, og Bergur Djurhuus komu inn fyri Ian Højgaard og Gert Langgaard, og lítla løtu undan sigursmálinum kom Sonni L. Petersen innfyri Óla Hansen.

Sigursmálið varð skorað eftir frísparksinnlegg úr vinstru. Aftur var heimaverjan óskettin. Bólturin varð lagdur í holið aftanfyri rúgvuna undir málinum, og miðverjin Arnfinn Langgaard var á rætta staðnum og stýrdi við fótinum bóltinum inn um strikuna, og tað bar øll stigini við sær. Men tað eigur NSÍ fyrst og fremst at takka Jens Martini Knudsen fyri. Við meistarligari bjarging í síðstu løtu tryggjaði hann, at NSÍ vann 2–1.

### Dysturin í tølum

**EB/Streymur-NSÍ**
**1-2 ( 0-1)**
0-1: Jónstein Petersen 8
1-1: Sorin Anghel (br.) 64
1-2: Arnfinn Langgaard 72
Dómari: Jens Petur Brattalíð

EB/Streymur: Gunnar á Steig – Hallur Jacobsen, Andrzej Pacek, Knút Vesturtún, Esmar Eiðisgarð – Marni Djurhuus, Ronnie Samuelsen, Jákup Martin Joensen – Teitur Joensen, Sorin Anghel, Hans Pauli Samuelsen
NSÍ: Jens Martin Knudsen – Pól Thorsteinsson, Djóni N. Joensen, Arnfinn Langgaard, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Kári Hansen, Ian Højgaard, Jónstein Petersen – Christian Høgni Jacobsen, Óli Hansen

## Puslispælið



Kappingin um at vinna eina ferð til landsdystin millum Týskland og Føroyar er framvegis í gongd. Alt, sum tygum nýtir at gera, er at savna allar brikkarnar í puslispælinum, soleiðis at ein fullfíggjað mynd fæst burturúr, og senda okkum hesar saman við kappingarseðlinum, sum er í serblaðnum »Fótbóltur 2002«

**-jm**